umhvørvisstovan

# Umhvørvisgóðkenning

**Sambært kapittul 5 í Ll. Nr. 134 frá 1988 um umhvørvisvernd**

<table>
<tr><td colspan="2">Navn á virki við góðkenning:<br>Byrsufelagið Eysturskot</td></tr>
<tr><td colspan="2">Bústaður hjá virki:<br>Regnavegur 8, 520 Leirvík</td></tr>
<tr><td colspan="2">Galdandi fyri virksemi:<br>Skjótivøllur</td></tr>
<tr><td>Matr. nr.:<br>429 í Leirvík</td><td>Mál nr.:<br>17/00212</td></tr>
<tr><td colspan="2">Galdandi frá:<br>19.04.2018</td></tr>
</table>

Umhvørvisstovan, tann 19. apríl 2018

Suni Petersen, deildarleiðari

/

Vivie Kirke Davidsen,
umhvørvisviðgeri

## 1. Góðkenning

Umhvørvisgóðkenningin av skjótivøllinum hjá Eysturskot, matr. nr. 429 í Leirvík, er givin við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, við seinri broytingum, og grein 1, stk. 4 og 4a, í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994, seinni broytt í grein 5, nr.1 og 4 í kunngerð nr. 90 frá 28.september 2007 um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna.

## 2. Umsókn

Umhvørvisstovan hevur móttikið umsókn um umhvørvisgóðkenning, dagfest hin 20.03.2017, av skjótivølli hjá Eysturskot í Leirvík. Orsøkin til at umsóknin ikki er gingin á møti fyrrenn nú, er, at bíðað hevur verið eftir, at byggisamtyktin fyri økið har virksemi skal vera, er broytt.
Saman við umsóknini og eftirfylgjandi hevur Umhvørvisstovan móttikið tekningar sum sýna innrætting av virkseminum.
Eisini hevur Umhvørvisstovan verið og vitjað á staðnum, og tosað við umboð fyri Eysturkommunu. Tað móttikna tilfarið og vitjanin hava verið grundarlagi undir viðgerðini av umsóknini.

## 3. Endamál

Endamálið við umhvørvisgóðkenningini er at fyribyrgja og avmarka dálking av náttúru og umhvørvi og at minka um ampar, sum kunnu standast av virkseminum.

## 4. Lýsing av virkinum

Skjótivøllurin er á matr. nr. 429 í Leirvík. Eysturskot hevur fingið loyvi frá Búnaðarstovuni at brúka økið, og byggisamtyktin fyri økið er nýliga broytt, soleiðis at virksemið kann staðsetast á staðnum.

Virksemið liggur eftir byggisamtyktini í øki F, sum er frítíðar- og mentanarøki. Tað er Eysturkommuna sum stendur fyri leigumálinum av lendinum, har skjótibreytin skal staðsetast.

Skotið verður eftir leirdúgvum, ið verða kastaðar út við kastimaskinu. Skotið verður við patrónum við stálhøglum. Um skjótivirksemið økist munandi, skal umsókn latast Umhvørvisstovuni, sum tekur støðu til um nýggj góðkenning skal gerast.

Breytin vendir soleiðis, at skotið verður út móti sjónum og verður innrættaður soleiðis, at hylki og patrónproppar verða fangað av einum volla, sum verður gjørdur á staðnum.

Væntandi verður vant tvær ferðir um vikuna, tveir tímar hvørja ferð, og verða tað í mesta lagið sjey kappingar um árið.

Ruddað eigur at verða eftir hvørja venjing. Hetta eru patrónhylki, patrónproppar og leirdúgvuleivdir.

## 5. Viðgerð

Í viðgerðini er dentur lagdur á, hvør møgulig dálking á umhvørvi stendst av virkseminum. Í dag verður skotið við stálhøglum. Fyrr varð skotið við blýggjhøglum og leirdúgvur, ið innihildu tjøru, vórðu brúktar. Hetta hevði við sær dálking av økjum, serliga orsakað av blýggjhøglum.

Tað er bannað at skjóta við blýggjhøglum á økinum, og skal felagið nýta tær mest umhvørvisvinarligu leirdúgvurnar og patrónirnar, sum fáast á marknaðinum. Viðvíkjandi ampum frá óljóðið, verður treyt sett um, at felagið altíð miðar ímóti at brúka patrónir, sum og patrónir, ið ikki hava patrónproppar úr plasti og sum geva minst møguligt óljóð.

Treyt verður harafturat sett um, at einki burturkast ella annað árin frá skjótivirkseminum má enda í fjøruni ella á sjónum. Tískil má felagið leggja skjótingina soleiðis til rættis, at hvørki leirdúgvur, patrónhylki ella patrónproppar kunnu enda í fjøruni ella á sjónum.
Uppskot til umhvørvisgóðkenning, varð hin 23.03.2018 send Eysturskot og Leirvíkar kommunu til hoyringar. Ongar viðmerkingar vórðu.

## 6. Góðkenningartreytir

Umhvørvisgóðkenningin er givin við niðanfyri nevndu treytum.

### 6.1 Almennar treytir

6.1.1 Boðast skal Umhvørvisstovuni frá, tá farið verður undir virksemið.

6.1.2 Henda umhvørvisgóðkenning, við møguligum broytingum og dagføringum, skal altíð finnast á virkinum, og skulu øll viðkomandi starvsfólk kenna innihaldið og krøvini í góðkenningini.

6.1.3 Gongur meiri enn eitt ár, áðrenn farið er undir ætlanina, fellur umhvørvisgóðkenningin burtur.

6.1.4 Virksemið má ikki víðkast ella broytast rakstrarliga á ein hátt, ið økir dálkingina, uttan nýggj góðkenning er givin.

6.1.5 Allar sýnistøkur og kanningar v.m., sum verða kravdar í umhvørvisgóðkenningini, skulu gerast av óheftum stovni ella felag, sum hevur førleika og útgerð at gera arbeiðini.

6.1.6 Eysturskot rindar fyri allar sýnistøkur, kanningar og metingar av úrslitum.

6.1.7 Um virksemið steðgar fyribils, skal tilfar og útgerð uttandura antin tryggjast soleiðis, at tey ikki eru til ampa fyri umhvørvið ella beinast burtur.

6.1.8 Heldur virksemið uppat, skal Umhvørvisstovan hava boð um hetta í minsta lagi tríggjar mánaðir frammanundan at virksemið steðgar, við eini ætlan um, hvussu virkið verður riggað av.

6.1.9 Umhvørvisstovan hevur eftirlit við virkinum. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.

6.1.10 Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning eftir aðrari lóggávu.

6.1.11 Í 5 ár eftir at góðkenningin er givin kunnu ikki gevast onnur boð ella forboð enn ásett eftir hesi góðkenning, uttan so at:

- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingarskaðaárin.
- dálkingin elvir til umhvørvislig skaðaárin, ið ikki kundu síggjast frammanundan, tá ið góðkenningin varð givin.

- dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir.

6.1.12 Tá ið meira enn 5 ár eru gingin eftir at góðkenningin er lýst, kann Umhvørvisstovan broyta treytirnar í góðkenningini, tá ið tað er umhvørvisæliga grundað, ella um betri reinsingarhættir ella minni framleiðsluhættir eru komnir fram.

## 6.2 Innrætting og rakstur

6.2.1 Virksemið skal rekast sum sagt er frá í umsóknini, og soleiðis, at treytirnar í hesi góðkenning altíð verða hildnar.

6.2.2 Øki, sum hoyra til virkið, skulu verða týðiliga avmerkt.

6.2.3 Miðast skal miða eftir at nýta tilfar, ið hevur minst møguligt árin á umhvørvið, eitt nú patrónir, ið ikki hava patrónproppar úr plasti og sum geva minst møguligt óljóð.

6.2.4 Um leidúgvuleivdir, patrónproppar o.a. fer oman í fjøruna ella á sjógv, skal hóskandi forðing setast upp, eitt nú net.

6.2.5 Um virksemið heldur uppat, skal alt tilfar og øll útgerð beinast burtur.

## 6.3 Innaneftirlit

6.3.1 Tá skotið verður, skal ein ábyrgdarpersónur frá felagnum altíð vera til staðar, sum tryggjar, at treytirnar í hesi góðkenning verða hildnar.

## 6.4 Óljóð, ristingar og ljós

6.4.1 Ískoytið til óljóð[1] frá virkseminum má ikki fara upp um virðini í talvu 1.

Talva 1: Markvirði fyri óljóð - dB(A)

| Dagur | Tíð | Øki 1 | Øki 2 | Øki 3 | Øki 4 |
|---|---|---|---|---|---|
| Mán – frí | 07.00 - 18.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Ley | 07.00 - 14.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Mán – frí | 18.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Ley | 14.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Halgidagar | 07.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Allar dagar | 22.00 - 07.00 | 70 | 60 | 40 | 35 |

Øki 1: Vinnuøki og havnarøki, har larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 2: Vinnuøki og havnarøki, har minni larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 3: Blandað bústaðar- og miðstaðarrøki.
Øki 4: Bústaðarøki.

6.4.2 Í tíðarskeiðinum kl. 22-07 kann óljóð (løtuvirði) í bústaðarøkjum (øki 3 og 4) í mesta lagi fara 15 dB(A) upp um omanfyrinevndu markvirði.

6.4.3 Virksemið skal ikki hava við sær ampar av óljóði, íroknað lág- ella háfrekventum óljóði, ristingum, ljósi ella geislingum. Um ampar verða av hesum, skulu neyðug tiltøk setast í verk.

[1] Ásett sum tað ekvivalenta, korrigeraða óljóðstøðið í dB(A) í viðkomandi økjum sambært kommunalu byggisamtyktini.

## 6.5 Burturkast

6.5.1 Patrónhylki, patrónproppar, leirdúgvuleivdir og annað burturkast skal takast upp aftan á hvørja skjóting.

6.5.2 Alt burturkast skal handfarast í samsvari við galdandi reglur um burturkast[2].

6.5.3 Burturkast skal goymast soleiðis, at tað ikki er til ampa.

6.5.4 Burturkastið skal latast góðkendum móttakara, og skal skiljast sambært ásetingum móttakarans.

## 6.6 Rakstrarskráseting

6.6.1 Virkið skal skráseta hesar upplýsingar:

- Nær skotið verður, dagur, byrjan og endi, tal av skotum og leirdúgvum,
- Nær ruddað er,
- Nøgd av burturkasti.

6.6.2 Umhvørvisstovan kann krevja aðrar skrásetingar enn tær, ið eru nevndar.

6.6.3 Felagið ger á hvørjum ári uppgerð av rakstrarskrásetingum og frágreiðing um umhvørvisviðurskifti. Frágreiðingin og uppgerðin skal sendast Umhvørvisstoguni í seinasta lagi 1. mars í avloysandi árinum.

6.6.4 Skrásetingarnar skulu goymast í minsta lagi í 5 ár, og teir skulu vera til taks hjá Umhvørvisstovuni.

6.6.5 Virkið skal í seinasta lagi 1. mars senda Umhvørvisstovuni rakstrarskrásetingar, úrslit av mátingum o.a. í undarnfarna árið.

# 7 Kæruvegleiðing

Hendan avgerð kann sambært grein 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2008 kærast til landsstýriskvinnuna við umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuna, sum síðan sendir hana til landsstýriskvinnuna við umhvørvismálum saman við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er fýra vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

**Avrit:** Eysturkommuna, Oyran 2, FO-512 Norðragøta
Landslæknin, Sigmundargøta 5, Postboks 9, FO-110 Tórshavn

[2] Kunngerð nr. 147 frá 19-10-1995, um burturkast, og kunngerð nr. 40 frá 09-04-1992, um lívrunnið burturkast frá alivinnuni, seinni broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007.